Fiat Brava og Bravo

Higartil hevur verið stórur munur á Fiat Brava og Bravo. Næsta ár kemur nýtt modell, har tað verður sami bilur við trimum ella fimm hurðum.

Kelda: FDM / Motor

Skoda Fabia ársins bilur

Enska bilblaðið »What Car« hevur kosið tann vælumtókta Skoda Fabia til ársins bil.

Kelda: Bilen Motor & Sport

Nýggjan hýruvogn í 2002

Í 2002 kemur ein nýggjur Mercedes Benz E-Klasse, tann ið vanliga verður nýttur sum hýruvognur. Hetta verður ein tryggur bilur, við ikki færri enn 12 airbag.

Kelda: FDM / Motor

Tvær síður av somu søk — Agila og Wagon R

Magnus Gunnarsson

Tá Suzuki Wagon R kom til Danmarkar í 1998, vóru tey fá, ið trúðu uppá, at hann fór at verða so væl móttikin sum hann bleiv.

Í 1999 vóru seldir næstan trý túsund bilar í Danmark, og í Japan hevur Wagon R verið mest seldi persónbilur, seinastu tvey árini.

General Motors hevur gjørt samstarvsavtalu við Suzuki. Nýggjasti Opel Agila er sami bilur, sum Suzuki Wagon R

Ikki somu motorar

Nú vil General Motors hava ein bita av køkuni, og hava teir gjørt samstarvsavtalu við Suzuki. Nýggjasti Opel Agila er sami bilur, sum Suzuki Wagon R.

Opel Agila verður bygdur á einari nýggjari GM verksmiðju í Pólandi, meðan Suzuki Wagon R verður gjørdur í Ungarn. Munurin á bilunum er sera lítil, umframt búmerkini er t. d. onkur munur á síðulistum og kúfangarunum. Motorarnir eru ikki teir somu, Opel Agila fæst við einum 1.01 motori við 58 hk, og einum 1.2 l motori við 75 hk.

Suzuki Wagon R fæst einans við einum 1.3 l motori við 76 hk.

Munurin á motorunum ger, at tað ikki skal vera so lætt at samanlíkna bilarnar, tí prísirnir verða eisini ymiskir.

12 ára garanti móti gjøgnumtering

Báðir bilarnir koyra væl, og teir størru motorarnir hava nóg nógvar kreftir og eru komfortablir, ljóðleysir og sera økonomiskir.

Bilarnir eru smáir uttan, longdin er einans 3.50 m, rúmligir innan – og praktiskir.

Her er talan um framtíðarbilar, har tú situr høgt, við góðum útsýni og lætt er at koma inn á parkeringsplássini.

Wagon R og Agila hava báðir 12 ára garanti móti gjøgnumtering. Frá bilasøluni hjá Meinhardt Arge frættist, at Opel Agila verður her í næsta mánað.

Peugeot 307 Cabrio-Coupé í 2003



Magnus Gunnarsson

Væntandi fer komandi avloysarin hjá Pougeot 306 at eita 307, og kemur hann eisini at fáast í eini Cabrio-Coupé útgávu í 2003. Hesin bilurin skal hava el-tak, sum við at trýsta á ein knøtt glíður niður í viðførisrúmið, og verður hann tá ein nútíms cabriolet. Við takinum á sær hann út sum ein vanligur coupé – kanska ikki heilt vanligur – tí talan er um ein sera elegantan bil, sum tað sæst á hesi myndini hjá teknaranum DeLusi.

Kelda: FDM / Motor

Jóhan Mortensen frá Amerada Hess við nøkrum av bilunum, sum Amereda Hess letur gera á hvørjum ári

Smádreingir gleða seg til pápin fær ein bil í jólagávu

Magnus Gunnarsson

Flestu monnum dáma væl bilar, og modellbilar kunnu minna á tíðina, tá teir vóru smádreingir og droymdu um, hvat teir skuldu gera, tá teir blivu stórir. Fleiri hava sum smádreingir sagt, at teir skulu koyra ein reyðan brandbil ella annan stóran bil.

Hetta hevur oljufelagið Amerada Hess funnið útav og gjørt nakað við, tí eru tað helst fleiri smádreingir í Føroyum, sum gleða seg til, at pápin fær ein modellbil í jólagávu frá Amerada Hess, tí so sleppa teir at spæla við hesar bilar.

Modellbilar til Thanksgiving Day

Oljufelagið Amerada varð stovnað í 1919, og oljufelagið Hess í 1933. Í 1963 vóru hesi feløg løgd saman til Amerada Hess. Síðan 1964 hava teir gjørt modellbilar, sum verða seldir á Hess bensinstøðum í USA, sum eru kendar fyri at vera sera kundavinarligar.

Hesir bilar koma á marknaðin til Thanksgiving Day, sum er fyrsti hósdagur í november, og halgidagur í USA síðan 1864. Henda dag geva fólk gávur, og eru tað fleiri, sum fáa ein Hess modellbil sum gávu. Her hjá okkum verða modellbilarnir givnir sum jólagávur til viðskiftafólk og onnur, sum oljufelagið hevur samskifti við. Hjá nógvum er hetta er vorðið eitt samlaraevni, og fyri tey, sum eiga allar bilarnar, hevur hetta savn stórt virði.

Nýtt modell hvørt ár

Hesir modellbilar er góð reklama fyri Amerada Hess. Nýtt modell kemur hvørt ár.

Tað fyrsta modellið fyri 1964-1965 var ein Hess tangabilur, í 1966 var tað ein Hess tangabátur, men síðan tá hava tað verið bilar, mest tangabilar, eisini brandbilar, mobilhome, trailarar, politibilar.

Í 1999 varð tað ein trailari við eini rúmdarrakett og einum fylgisveini. Felags fyri hesar modellbilar er, at teir eru væl gjørdir og originalir við øllum hugsandi ljósum, ljóði og lúkum at lata upp.

Um vit t. d. taka ein mobilhome frá 1998, so hevur hann eina motorsúkklu og ein bil eru inni í. Motorsúkklan og bilurin heilt original við øllum sum hoyrur til, t. d. ljósum og ljóði.

Nógvir bilar verða gjørdir hvørt ár, talið er ikki alment, men í 1993 vórðu gjørdir 1,5 milliónir bilar. Spennandi verður at vita, hvussu